# Lønirnar minka

Lønirnar í oddinum á fíggjarsektorinum eru minkaðar. Fíggjarkreppan fær skuldina fyri, at bankarnir í 2009 tilsamans skóru 12,7% av lønunum til nevndirnar. Hetta svarar til, at leiðslurnar tilsamans fingu 21,7 milliónir krónur færri í løn í 2009 sammett við 2008, skrivar danska blaðið boersen.dk. Samlaða minkingin heldur hóast bankarnir væl at merkja hava økt um lønarútreiðslurnar. Samlað eru leiðslurnar farnar frá 171,3 milliónum krónum niður í 149,6 milliónir krónur í lønum. Tað er tó stórur munur á, hvat ymsu bankarnir rinda í løn til sínar leiðslur. Amagerbanken hevur til dømis skorið meiri enn helmigin av lønunum burtur, meðan Vestjysk Bank hevði eina øking í lønunum upp á 90%. Tó skal sigast, at leiðslan fór frá einum til tveir stjórar í sambandi við eina samanlegging við Ringkøbing Bank.






Síðan Tavan í Leirvík fór undir gulllaksavirksemi í 1994, hevur felagið øll árini havt avlop í rakstrinum. Í fjør gjørdist avlopið nógv tað størsta nakrantíð

Mynd: Vilmund Jacobsen



Jóan Magnus Rasmussen er stjóri í Tavuni

Mynd: Vilmund Jacobsen

laksaveiði, sigur stjórin í Tavuni.

Tavan er veitari av gulllaksi alt árið.

Enn liggur ein lítil partur av framleiðsluni frá 2009 eftir á goymslu, og soleiðis skal tað eisini vera, tá felagið hevur veiting alt árið – og eisini, tá gulllaksavertíð ikki er.

# Landaðu á Sandi og í Vestmanna

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Partrolararnir Eysturbúgvin og Vesturbúgvin landaðu í gjár. Skipini, sum hendan túrin vóru úti í tilsamans 9 dagar, høvdu góð 200.000 pund tilsamans.

Eysturbúgvin landaði á Sandi og Vesturbúgvin í Vestmanna.

Dánjal Jacobsen, reiðari á Vesturbúgvanum, sigur, at minni er at fáa av upsa nú, og sum várið líður, verður úrtøkan í fiskinum eisini minni.

- Fiskurin hevur júst gýtt, og tá minkar úrtøkan, sigur hann.

Reiðarin leggur aftrat, at kappingin um fiskin saktans kann halda prísinum uppi, tó at úrtøkan nú er minkandi.

Dánjal Jacobsen sigur, at upsaprísurin í løtuni liggur millum 6 krónur og 6 krónur og 50 oyru.

Eysturbúgvin og Vesturbúgvin fóru nýggjan túr í gjárkvøldið.

Reiðarin í Vestmanna væntar annars, at skipini fara á gulllaksaveiði, tá komið er nakað út í apríl mánaða.

- Enn hava vit ikki gjørt av, nær farið verður á gulllaksaveiði, men hetta kann henda so knappliga, tá vit eru komin nakað út í apríl, sigur Dánjal Jacobsen, reiðari á Vesturbúgvanum.



*Vesturbúgvin (mynd) landar vanliga í Vestmanna – og Eysturbúgvin á Sandi*

Mynd: Birgir W. Høgnesen

# Nornagestur og Kolumbus fyri 2 miljónir



*- Eg kundi hugsað mær, at skipini vórðu verið seld, um vit fingu eina miljón krónur fyri hvørt skipið, sigur annar eigarin, Dánjal Jacobsen*

Mynd: Birgir W. Høgnesen

**- Fáa vit tvær miljónir fyri bæði skipini, vænti eg, at vit høvdu selt, sigur reiðarin, Dánjal Jacobsen**

GOMUL SKIP

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Teir liggja í Vestmanna við ongum fiskidøgum. Dagarnir eru fluttir yvir á Nónhamar og Fjalshamar, sum felagið, ið eigur gomlu skipini, hevur keypt.

Nornagestur og Kolumbus eru smíðaðir í sekstiárunum og royndu í sínari tíð við línu. Seinni vórðu teir umbygdir til trolarar.

Bæði skipini hava sína søgu. Av Sandi vórðu teir seldir til Vestmannar, har felagið Vár keypti skipini. Teir, ið eiga P/F Vár, eru Dánjal Jacobsen og Tummas Christophersen.

- Fiskidagarnir eru fluttir yvir á Nónhamar og Fjalshamar, sum okkara felag hevur keypt úr Klaksvík. Tað verða ikki vit, sum loysa skipini aftur, men fyri tann skuld verða tey ikki latin fyri ein og hvønn prís.

Dánjal Jacobsen, reiðari, sigur, at Nornagestur og Kolumbus eru í hampiligum standi, tó at skipini eru gomul.

- Tey eru til sølu og kundu eitt nú verið brúkt sum línuskip, sigur hann.

Reiðarin sigur, at hann og Tummas Christophersen hava ikki tosað saman um, hvat skipini skulu seljast fyri.

- Men eg kundi hugsað mær, at tey vórðu seld, um vit fingu eina miljón fyri hvørt skipið.

Dánjal Jacobsen sigur, at onkrir fyrispurningar hava verið, men enn er eingin avgerð tikin um sølu.